# Kommunan á fartelefonini



*Heðin Mortensen, borgarstjóri, og Regin Dalsgaard, stjóri ISUUS Mobile.*

**Nú ber til hjá borgarunum at fáa kunning frá Tórshavnar Býráð umvegis fartelefonina**

FARTELEFONI
*tíðindaskriv*

Í samstarvi við fyritøkuna ISUUS Mobile, víðkar Tórshavnar kommuna um tænastuna, við at bjóða kunning um fartelefonina. Til ber, at senda eini sms boð til nummarið, 285000 við tekstinum: "svimja", beinanvegin, fært tú eini boð við upplatingartíðunum hjá Svimjihøllini.

Skrivar tú "rusk" í eini boð, fært tú upplatingartíðirnar á Endurnýtsluni, ella um tú skrivar snarskivan, fært tú upplatingartíðirnar hjá kommununi. Ætlanin er at víðka um tænastuna, soleiðis, at enn fleiri møguleikar verða.

Eingin ivið er um, at fartelefonin gerst alt størri partur av okkara gerandisdegi og samskifti, og Tórshavnar kommuna ætlar ikki at sita og bíða eftir framtíðini. Vit ætla at verða við til at skapa hana.





Starvsfólk
TIL PERLUNA Í SMS

**Fulla tíð og aftaná skúlatíð**

Søkt verður eftir fólki M/K í aldrinum 16-30 ár til fulltíðarstarv og at arbeiða aftaná skúlatíð - at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara.
Vit gleða okkum at hoyra frá tær...



Send umsóknina til:
Perlan, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.

Perlan

KT-Kleking er ein vinnumennandi verkætlan undir KT-ætlan Vinnumálastýrisins, har karmar verða skaptir fyri menning av nýggjum KT-fyritøkum. KT-klekingardepilin er partur av Menningarstovuni.



TEAM85

Smakkar hugskotið av veruleika?

KT-Kleking bjóðar til kapping um góð KT-hugskot. Kappingin er fyri teg, sum hevur eitt gott KT-hugskot, men enn ivast í hvussu tað kunnu gerast veruleiki.

Í metingini av hugskotum verður dentur lagdur á eina heildarmeting av verkætlanini, eitt nú um tað ber til at fremja verkætlanina í ásetta tíðarskeiðinum.

Tey bestu KT-hugskotini fáa møguleika at vinna innivist og løn í 3 mánaðir, meðan arbeitt verður við hugskotinum. Hevur hugskotið neyðugu dygdina hevur tað møguleika at fáa ókeypis innivist í KT Kleking í upp til 2 ár til víðari menning av hugskotinum.

Ynskir tú vegleiðing í sambandi við títt KT-hugskot, kanst tú tosa við depilssamskiparan, ella vitja á heimasíðuni. Ein hugskotslýsing skal leggjast við umsóknini. Oyðublað til hugskotslýsing finnur tú á www.kleking.fo. Tú kann eisini venda tær til depilssamskiparan á tlf. 353100 ella 217366, ella á teldupostadressu: kleking@kleking.fo.

Uppskot til kappingina skulu verða okkum í hendi innan 6. juni 2005. Úrslitið verður kunngjørt seinni í juni mánaða.

KTKLEKING

KT-Kleking · Postboks 259 · 110 Tórshavn · Tel. 35 31 00 · kleking@kleking.fo · www.kleking.fo